# Heimarøktin styrkjast við samdøgursrøkt og økisterapi

TÍÐINDASKRIV

Heimarøktin verður víðkað til at fevna um samdøgursrøkt. Hendan ætlanin er partur av stavnhaldinum hjá sitandi samgongu, og nú verður farið frá orði til gerð.

Landsstðrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, hevur avgjørt at seta á stovn samdøgursrøkt, sum um stutta tíð verður partur av teimum tilboðum, ið verandi Heimarøkt kann veita.

Umframt samdøgursrøktina verður økisterapi eisini at finna millum tænastutilboðini hjá Heimarøktini í næstum.

**Samdøgursrøkt**
Í dag kunnu okkara eldru og onnur við tørvi á hjálp fáa vitjan av Heimarøktini um dagin og um kvøldið. At eingin hjálp fæst um náttina man vera til miklan ampa fyri nógv fólk, bæði tey eldru og teirra avvarðandi, sum mugu liva við tilvitanini um, at næturnar eru merktar av ótryggleika.

Við teirri komandi samdøgursrøktini vónar landsstýrismaðurin í almannamálum, at hesin ótryggleikin fæst burtur við tað, at okkara eldru kunnu koma í samband við fólk við heilsu-útbúgving alt samdøgrið.

Samdøgursrøktin fer at gera umstøðurnar hjá heimabúgvandi eldri fólki tryggari, og fer eisini at geva teimum, sum hava tørv á røkt alt samdøgrið, ein møguleika at velja at verða heima heldur enn at vera á stovni.

**Økisterapi**
Økisterapi skal setast í verk í teimum 6 heimarøktarøkjunum kring landið. Talan verður um ergo- ella fysioterapeutar, sum fáa í uppgávu at skipa fyri uppvenjing og framhaldandi at røkja vunnan førleika hjá teimum, sum einhvørsvegna tørva viðgerð, eftirviðgerð ella fyribyrgjandi tiltøk. Ætlanin er eisini, at økisterapeutarnir fáa týdningarmiklan leiklut í nýskipanini av hjálpartólaøkinum.

At Heimarøktin verður styrkt við fysio- og ergoterapeutum, merkir eina munandi betraða tænastu til borgaran. Við hvørjum einstøkum brúkara í huga skulu økisterapeutarnir betra um møguleikarnar hjá fólki at vera verðandi í egnum heimi, tá heilsan bilar teimum. Eisini skulu økisterapeutarnir virka sum millumlið millum sjúkrahús og heim, tá ein sjúklingur er útskrivaður av sjúkrahúsi.

Tað slepst soleiðis undan óneyðugt at leggja fólk inn av nýggjum til eftirviðgerð. Økisterapeutarnir geva ráð og fyribyrgjandi viðgerð, antin heima hjá sjúklingunum ella aðrastaðni í nærumhvørvinum.

**Sum longst í egnum heimi**
Ynski hjá nógvum eldri fólki um at vera sum longst í egnum heimi er ein av orsøkinum til, at landsstðrismaðurin í almannamálum hevur gjørt av at styrkja tænastuútboðið frá Heimarøktini við økisterapi og samdøgursrøkt. ”Summi av okkara eldru halda seg kanska ikki til at búgva fyri seg sjálvi, og onnur kunnu vera ov illa fyri likamliga til at vera einsamøll undir lonini. Við møguleika at fáa røkt alt samdøgrið verða umstøðurnar hjá teimum tryggari”, sigur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum.

Lýsingarnar eftir starvsfólki koma í bløðini fyrst í næstu viku, og so skuldi ikki long tíð gingið, áðrenn Heimarøktin fer í holt við at veita hesi tilboð til allar borgarar í Føroyum.

VIÐMERKINGAR

# Valdømi, útbyggingar o.a.

**Ein viðmerking til Jógvan við Keldu**

**Pól á Kletti**
*blaðmaður*

Baksíðuteigur Dimmalættingar, Hinvegin, er – sum navnið sigur – ein stuttorðað øðrvísi hugsan um dagsins viðurskifti ymsar vegir. Í so máta átti viðmerking mín viðv. valdømisskipanini ikki at staðið í hesum teigi, men í kjak- og meiningateigi Dimmalættingar. Tí hon viðmælti sjónarmiðinum hjá Jákup Sverra Kass um at skipa Føroyar sum eitt valdømi.

Síðani havi eg fingið eitt aftursvar frá Jógvani við Keldu, løgtingsmanni, Klaksvík. Hann biður meg svara seks spurningum frá sær. Tað fari eg ikki at gera – ið hvussu er ikki sum hann biður. Í fyrra lagi tí, at eg í viðmerkingum mínum ikki nevndi nakað ávíst øki í landinum, tá eg umrøddi heimabeitispolitikk og ørvitisprojekt, men nevndi viðurskiftini í síni heild. Í øðrum lagi tí, at eg haldi, at tal- og valkøn og búskaparkøn kunnu svara mongum av hasum spurningunum betur enn eg. Og haraftrat fyrikoma spurningarnir mær sum ein avhoyring. At eg skal standa skúlarætt. Tað ætli eg mær ikki.

Men eg skal í stuttum lýsa støðu mína gjøllari. Fyrst valdømisskipanin:

Vit eru einki millióna-samfelag, men einans uml. 48.000 fólk. Tess færri vit eru, tess meiri áneyðir eru, at vit standa saman og lyfta í felag. Eitt valdømi hevði sjóðað okkum meira saman sum fólk. Sigi fyri meg, at eg – hóast eg búgvi í Havn – nógv heldur hevði valt ein skilagóðan klaksvíking á ting enn ein minni skilagóðan havnarmann. Tað er kapasiteturin í knokkinum og hegnið at reka politikk, ið umræður. Tað var Janus skald Djurhuus, sum einaferð tók soleiðis til, at Føroyar vóru ikki eitt land, men seytjan oyggjar, hvør móti aðrari. Og á oyggjunum vóru tað aftur kommunurnar, bygdirnar og býlingarnir, sum sínámillum stríddust og royndu at krøkja hvør til sín. Talað varð aldrin um føroyingar í síni heild. Slíkt skapar sundurlyndi. Kommunusamanleggingin nú er eitt stig á leiðini at koma hesum sundurlyndi til lívs. Næsta stigið eigur at verða valdømini.

Og hvat útbygging í samfelagnum viðvíkur kann eg siga, at hon eigur at verða raðfest samsvarandi kostnaðarnyttukanningum og samfelagsbúskapinum í síni heild. Vit hava upplivað – enntá í sváru kreppuni fyrra helming av 1990-árunum tá føroyska samfelagið ók á knøunum – at tingmaður/menn í ávísum valdømi hóttu við samgongusliti, um ikki ávís kostnaðarmikil bergholsætlan varð sett í verk.

Er skil í hesum, at ávísir tingmenn skulu sleppa at trumfa sítt ígjøgnum samstundis sum øll hini skulu spenna lívreimarnar?

Í góðum tíðum er gaman í at rista breiðar álir. Eg ivist ikki í, at bæði undirsjóvartunnilin millum Vágar og Streymoy og ein komandi millum Eysturoy og Norðoyar fer at skapa trivnað í hesum økjum, tí talan er um øki, har nógv vinnuvirksemi er frammanundan. Men vit hava sæð milliónaupphæddir blakaðar burtur til onga nyttu. Til projekt, sum ein helt fóru at geva mennandi úrslit, men ikki gjørdu tað.

Í tveimum førum er talan um avtofting.

# Miðsummarhald í Klaksvík

TÍÐINDASKRIV
*Norðoya Fornminnafelag*
*Skótaliðini í Klaksvík*

Aftur í ár, fimtanda árið á rað, verður miðsummarhaldið ”náttúran og menniskja” í Klaksvík. Haldið verður nú leygardagin 21. juni, og eru tað skótaliðini í Klaksvík og Norðoya Fornminnafelag, sum skipa fyri tiltakinum við stuðli frá Klaksvíkar kommunu.

Sum vanligt tendra skótarnir eldarnar kl. 14 í Grøvini, har høvi verður hjá børnum og vaksnum at hugna sær til kvøldið kemur. Kl. 19 verður miðsummarrøðan, og í ár verður tað Jórun Høgnesen, mentanarnevndarformaður í Klaksvíkar bðráð, ið kemur at halda røðuna. Eisini verður sungið úr sangheftinum við stuðli frá Hans Michael Christiansen og øðrum. Aftaná tendra skótarnir bál niðri í fjøruni.

Sum siður er verður at enda farið ein gongutúr út í náttúruna. Í ár er ætlanin at ganga úr Grøvini niðan á Myrkjanoyarfjall, sum skuldi verið ein hampuliga lættur túrur hjá teimum flestu.

**Veðurvánirnar** fyri leygardagin eru hampuliga góðar, útnyðringur við sól, 9-11 stig, lítil vindur og kanska okkurt æl, so veðrið til at halda tiltakið verður ivaleyst gott.

Vælkomin til miðsummarhaldið í Klaksvík.

# Sløkkiliðsvenjing í Gøtu

TÍÐINDASKRIV
*frá Gøtu Sløkkiliði*

Tann 16. juni kl. 6 um kvøldið var hildin ein ófráboðað venjing í Gøtu. Sløkkiliðsleiðslan hevði fyrireikað eina hending á Gøtu Fiskavirki, har nøkur starvsfólk vóru komin til skaða. Kl 17.58 kom fráboðan um hendingina inn til alarmsentralin og eitt lítið bil eftir hetta hevði manningin hjá sløkkiliðunum í Gøtu, Lorvík og Fuglafirði fingið boðini. Alarmeringin gekk væl, og boðini sum manningarnar fingu vóru skillig og greið.

Manningin greiddi uppgávuna undir "kønari leiðslu" av brunaumsjónarmanninum Sørini Djurhuus. Tá venjingin var av møttist manningarnar saman við politinum og brunaumsjónini á brandstøðini til ein kaffimunn og fyri at gera eina sokallaða eftirmeting. Samanum tikið var semja um, at endamálið við tiltakinum hevði eydnast, og at tað er mennandi at hava venjingar av og á, - eisini at hava smáar venjingar sum hesa.

Sløkkiliðsleiðslan takkar við hesum øllum teimum luttakandi.

# Rock konsert í Losjuni í Gøtu fríggjakvøldið

TÍÐINDASKRIV

Fríggjakvøldið 20. juni verður rockkonsert við bólkunum Gestir og Makrel. Dyrnar lata upp kl. 22. Kostnaður 80 kr (limir í Grót 50 kr).

Prix vinnararnir Gestir vóru bodnir at spæla á Nibe Festival í Norður-Jyllandi 27 juni, og í tí sambandi hava teir gjørt nokkso fitt av nýggjum tilfari. Nú verður høvi hjá føroyingum at fáa ein lítlan forsmakk í Losjuni.

Makrel góvu út fløguna "Makrel Stinkar" herfyri og bæði Gestir og Makrel eru aktuellir á nýggju "Prix Krem" fløguni.

Tað er Tónleikasamtakið Grót ið skipar fyri.



# Rektarin: Ábreiðsla tikin til eftirtektar

**Ávaringin er ógildað. Ta avleiðingina hevur rektarin á Fróðskaparsetri Føroya tikið, eftir at Mentamálaráðið kolldømdi álvarsligu ávaringina, sum setursráðið gav Jógvani Mørkøre, adjunkti, tí hann úttalaði seg kritiskt um sonevndu Menas-frágreiðingina**

SETRIÐ
*Ingi Rasmussen*

– Vit hava tikið niðurstøðuna hjá Mentamálaráðnum til eftirtektar og hava gjørt, sum vit eru biðin um, sigur Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetri Føroya.

Sostatt er álvarsliga ávaringin, sum samfelagsfrøðingurin Jógvan Mørkøre fekk fyri at úttala seg um viðurskifti á Fróðskaparsetrinum, ógildað.

Sum Sosialurin skrivaði í gjár, so er Mentamálaráðið komið til ta niðurstøðu, at ein ávaring, sum Jógvan Mørkøre, adjunktur á Søgu- og samfelagsdeildini, fekk frá setursráðnum hin 22. februar í fjør, varð givin á skeivum grundarlagi.

Jógvan Mørkøre tók blaðið frá munninum í sambandi við sokallaðu Menas-frágreiðingina, sum varð reist sum fyrispurningur í Løgtinginum. Kanningin skuldi útgreina avleiðingarnar av einari føroyskari oljuvinnu og var fíggjað av BP. Jógvan Mørkøre fanst at tilgongdini til verkætlanina og helt ikki, at tað sømdi Fróðskaparsetrinum at leggja navn til frágreiðingina, sum spurdist burturúr.

Orðini tók setursráðið so illa upp, at Jógvan Mørkøre fekk eina ávaring og varð biðin um ikki at úttala seg meira í málinum. Tað fær Mentamálaráðið at siga í sínari niðurstøðu, sum er fráboðað 5. mai 2003, at hansara framsøgufrælsið er skert í óneyðugan mun í málinum. Harafturat vóru fleiri málsviðgerðarfeilir framdir, tá hann fekk ávaringina, og tí varð hon ógildað.

Malan Marnersdóttir, rektari, sum var burturstadd, tá Sosialurin fekk orðið á hana, sigur seg ikki hava pappírini framman fyri sær, men hon heldur ikki, at skerda talufrælsið er høvuðsboðskapurin í niðurstøðuni hjá Mentamálaráðnum.

– Í høvuðsheitum hava vit fingið at vita, at mannagongdin ikki var røtt í málinum, og tí hava vit fingið eina átalu, og hana hava vit tikið til eftirtektar, sigur Malan Marnersdóttir.

Spurd, um tað fær nakrar avleiðingar, at framferðin hjá rektara og setursráði ikki varð røtt, tá ávaringin fall, sigur hon:

– Fróðskaparsetrið leggur seg altíð eftir at fylgja galdandi mannagongdum, men kortini hendir tað, at tað gleppur, og tað hava vit so rættað, sigur Malan Marnersdóttir.

Sambært rektaranum er sjógvurin slættaður. Samstarvið við Mentamálaráðið er gott, sigur hon, og tað sama er galdandi innanhýsis á Setrinum.



*Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, hevur ógildað ávaringina, sum Jógvan Mørkøre fekk fyri at geva fólkum uttan fyri Setrið innlit í ivasama vísindaliga arbeiðið við Menas-frágreiðingini*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Nýggj leiðsla í P/f Atlantic Seafarm

**Partafelagið Atlantic Seafarm, ið rekur sjógvalibrúk í Suðuroy, hevur fingið nýggja leiðslu, sum arbeiðir við at umskipa virksemið og útvega fyritøkuni nýggjan kapital**

TÍÐINDASKRIV

Á eykaaðalfundi í P/F Atlantic Seafarm fríggjadagin 13. juni 2003 er avgerð tikin um at fremja broytingar í leiðsluni hjá fyritøkuni.

Christian Andreasen og Kári Nielsen eru nýggir nevndarlimir. Heri Hjelm heldur fram sum nevndarlimur, meðan Gudmun Strømsnes og Amy Bech eru farin úr nevndini. Amy Bech var nevndarformaður.



*Heri Hjelm*



*Christian Andreasen*

Nýggja nevndin er ein fyribilsnevnd, og hon hevur skipað seg við Christiani Andreasen sum formanni.

Stjórin hjá P/F Atlantic Seafarm, Heri Hjelm, er farin frá. Kortini ynskir hann framvegis at vera partur av fyritøkuni, og tí er hann framhaldandi við í nevndini. Sum fyribilsstjóri er settur Páll Leo úr Vági.

P/F Hovsá og P/F Suðurlaks eru knýtt at virkseminum hjá P/F Atlantic Seafarm. Nevndin í P/F Hovsá er farin frá og er nú mannað við somu fólkum sum nevndin í P/F Atlantic Seafarm. Í P/F Suðurlaks, har slaktið fer fram, eru øll starvsfólk søgd upp til 1. juli. Arbeitt verður í løtuni við at fá gongd aftur á sláturvirksemið í Vági. Væntandi fer virksemið í gongd aftur á virkinum um mánaðarskifti juni/juli.

Prísgongdin á marknaðinum hevur saman við ILA-sjúkuni elvt til kreppu í føroysku alivinnuni sum heild, og tað hevur eisini sett sítt merki á virksemið hjá P/F Atlantic Seafarm, ið rekur sjógvalibrúk í Suðuroy. Stór tap eru staðfest, og eginpeingurin er burtur.

Henda støða er høvuðsorsøkin til, at broytingar nú eru gjørdar í P/F Atlantic Seafarm.

Høvuðsuppgávan hjá nýggju leiðsluni er at endurskipa virksemið og royna at útvega fyritøkuni nýggjan kapital til tess, at virksemið skal halda fram.

Nýggja nevndin er farin til verka, og starvsfólkini hjá P/F Atlantic Seafarm, P/F Hovsá og P/F Suðurlaks eru kunnað um støðuna og broytingarnar í fyritøkuni.

Tíðindaskrivið er undirskrivað av Christian Andreasen, nevndarformaður, P/F Atlantic Seafarm og P/F Hovsá